Ejler Djurhuus, formaður í havnanevndini á Tvøroyri:

Ókyrra forðar ikki eini oljuútgerðarhavn á Drelnesi

Atløgusíðan uttan fyri ferjuleguna - á leið har sum saltsiloin er - hevur staðið sína roynd sum gott kyrrupláss

PÓL Á KLETTI

Ejler Djurhuus, formaður í Havnanevndini á Tvøroyri

Tað er eingin loyna, at Suðuroyggin í búskaparliga aldudalinum hevur verið eina meinast rakt við arbeiðsloysi - serstakliga syðra helvt. Men nú eru glottar fyri stavn við oljuvinnuni. Leitingar skulu fara fram sunnan fyri Føroyar og royndarboringar gerast í Lopra komandi summar.

Umboð fyri skotsku frálandafyritøkuna Seaforth Maritime, sum vóru í Føroyum í november, kjósaðu sær Drelnes á Tvøroyri sum oljuútgerðarhavn. Og Suðuroyggin verður yvirhøvur mett at vera væl útborin tá talan er um tænastur til frálandavinnuna. Í oynni eru smiðjur av ymsum slag - í Vági skipasmiðja -, tyrlupallur, gistingarhús, sjúkrahús o.s.fr.

Við búskaparligu framgongdini síðst í farnu øld og fyrst í hesari dró Suðuroyggin, frammalaga sum hon var vinnuliga, nógv fólk suður um fjørð í arbeiði. Men tíðir broytast. Seinastu mongu árini eru suðuroyingar farnir norður um fjørð í arbeiði. Men fer gamla mynstrið at endurtaka seg nú við oljuvinnuni - at Suðuroyggin aftur verður á odda?

- At bretska frálandavinnan hevur valt sær útgerðarhavn í Suðuroy - í hesum føri Drelnes - fer ikki bara at vera ein fyrimunur hjá suðuroyingum hvat arbeiði viðvíkur, men kemur øllum Føroyum til góðar. Tað eru ið hvussu er tey samd um, ið skil hava fyri frálandavinnu, sigur Ejler Djurhuus, býráðslimur, formaður í havnanevndini á Tvøroyri.

Í onkrari blaðgrein í seinastuni hevur verið ført fram, at Drelnes ikki er so væl egnað hjá oljuútgerðarskipum at leggja at. Víst hevur verið á, at rættiliga kyrruvont er á summum ættum hjá Smyrli og Teistanum at leggja at ferjuleguni.

- Orsøkin til ókyrruna út fyri ferjuleguna er ein helluskøltur í botninum. Og tað er serliga á landnyrðini, at ókyrra er. Men við gamla partin av bryggjuni - á leið har sum saltsiloin er - er væl liggjandi í øllum veðri, sigur Ejler Djurhuus.

Hann vísir á, at í einum tiltiknari landsynningsødn fyrst í februar 1950 lá ein saltdampari á Drelnesi og lossaði alla náttina uttan nakrar trupulleikar.

- Men tað er tað strekkið sum eftir er inn móti ferjuleguni, ið ókyrt er. Og ov illa kannaði Landsverkfrøðingurin umstøðurnar áðrenn arbeiðið byrjaði, sigur Ejler Djurhuus.

Tað eru nú øll tekin til, at Drelnes verður oljuútgerðarhavn. Vit spurdu Ejler Djurhuus um neyðugt verður hjá Smyrli og Teistanum at leggja at aftur við gomlu bryggjuna á Tvøroyri.

- Um tað verður fast, skal eg ikki siga, men valla slepst undan, at tað verður onkuntíð neyðugt um fleiri hjálparskip og onnur útgerðarskip hjá oljuvinnuni eru inni í senn; men eg ivist ikki í, at tað ber til at finna eina brúkbara loysn. Skip vera so ikki alla tíðina við Drelnes, sigur Ejler Djurhuus.



Orsøkin til ókyrruna út fyri ferjuleguna er ein helluskøltur í botninumOg tað er serliga á landnyrðini, at ókyrra er. Men við gamla partin av bryggjuni - á leið har sum saltsiloin er - er væl liggjandi í øllum veðri

Rosinan í pylsuendanum

Sum rosinan í pylsuendanum í øllum riðilinum av bókum upp undir jól kom nú MÁLTING 15. Blaðið hevur við hesi útgávu lagt fimta árgang aftur um bak - við trimum bløðum um árið. Sostatt hevur útgávuætlanin hildið hesi fyrstu fimm árini.



Tilfarið er sera fjølbroytt og fráskila áhugavert, og felags fyri allar greinirnar er, at tær eru stuttar og lættar.

Jóhan Hendrik W. Poulsen, professari skrivar um orðini *høgætt* og *lágætt* og um hvørjar hugmyndir kunnu liggja aftan fyri hesi heiti.

Fróði Holm Knudsen, ið lærir til tíðindamann, skrivar um føroyskar undirvísingarbøkur og um virksemið hjá Skúlabókagrunninum.

Óli Wolles studentaskúlalærari í Eysturoy hevur grein, sum hann kallar *Nakrir tankar um tátíðar lýsingarhátt,* har ið hann greinir munin millum tátíðar lýsingarhátt og lýsingarorð øðrumegin, og tátíðar lýsingarhátt og núlidna ella tálidna tíð hinumegin.

Ein umrøða av teirri nýggju donsku-føroysku orðabókini, sum Føroya Fróðskaparfelag hevur givið út, er eisini við í blaðnum - Zakaris S. Hansen og Jógvan í Lon Jacobsen hava skrivað, teir hava verið uppi í rættlestrinum av orðabókini.

Sum nakað nýtt er eitt dialektkort við, har Anfinnur Johansen hevur eitt yvirlit yvir øll tey heiti, ið nýtt verða um hetta at senda smáar flatar steinar hoppandi eftir vatnskorpuni. Og á kortinum sæst í hvørjum bygdum tey ymsu orðini eru uppskrivað.

Jógvan í Lon Jacobsen hevur eina grein um orðbýting í føroyskum, sum eitur *Skarpur verður hildarleikur, tá norðmenn mót norskum stríða.*

Nakrir stubbar eru í blaðnum. Marjun Simonsen skrivar ein stubba um eina nýggja bók eftir Tummas Lenvig, har ið hann viðger fyrstu føroysku skaldsøguna *Babelstornið* eftir Regin í Líð.

Tvær speirimur eftir Hjørdis Djurhuus eru prentaðar í blaðnum.

Jógvan í Lon skrivar um orðið *vág* og *vágur* og um orðið *úttuldaður.* Zakaris Hansen hevur ein stubba um máldeyða. Hjalmar P. Petersen skrivar um broyting hjá dr. Jakobsen nú 100 ár eru liðin síðan hann kom fram við sínum broytingaruppskoti til føroyska stavseting.

Hjalmar skrivar eisini ein stubba um tað sera sjáldsama orðið *vatur* í føroyskum. Og at enda er prentað eitt gamalt bræv, sum ein maður hevur skrivað, ið ikki hevur lært at skriva føroyskt. Hetta bræv er skrivað við einum slag av ljóðskrift.

Reiðiligheit ella undirgangur

Tá ein nú við árslok lítur aftur um bak og grundar yvir alt tað, ið sagt og skrivað varð um Føroyar og føroyingar í sambandi við avleiðingarnar av fíggjarkreppuni, serliga bankamálið, bæði heima og uttanlands, so kann mangur undrast á rúgvuna av tilfari, ið higartil er komið burturúr, og hvat endin verður.

Blaðfólk og fjølmiðlarnir annars hava stóra ávirkan á hin einstaka og samfelagið, sum bæði í tíð og ótíð skulu hava eina meining og úttala seg um bæði eitt og annað.

Tað er einki loyndarmál, at munur verður gjørdur á, hvat fólk leggja oyru og eygu til, tá talan er um tíðindaflutning. Til dømis tá blaðskrivingin var í hæddini viðvíkjandi bankamálinum, legði ein merki til, hvørji bløð og hvørjar blaðmenn, donsku politikararnir og onnur løgdu seg eftir at lesa og endurgeva.

Sannleikan fram um løtuvinning

Enska blaðið »Times« sigst vera eitt av heimsins mest lisnu bløðum. Ikki er óhugsandi, at ein av orsøkunum kann vera enska málið, men tað er neyvan allur sannleikin.

Danski dómpróasturin Skovgård Pedersen skrivaði í síni tíð m.a. um »Times« soleiðis: » – um blaðstjórin hevði sett sannleikan til viks fyri løtuvinning, hevði »Times« endað eins og mong onnur bløð, sum eitt talirør fyri dagsins gudi. Men blaðstjórin var ikki bert dugnaligur, hann bar høvdið hægri enn flest onnur, hvat sannleika viðvíkti.«

Blaðstjórin á »Times«, Johan Walter, ognaði sær við tíðini stóra ávirkan. Av fyrstu tíð var blaðið lítið og ikki serliga væl kent, men ein djúp samvitska lá aftan fyri blaðið.

Hin órímiligi og órættvísi prísurin

Skovgård Pedersen sigur, at umrødda blað ekkaleyst í síni byrjan átalaði óreglulígheit viðvíkjandi peningamálum hjá ávísum enskum ráðharra, sum revsaði blaðstjóran við at taka frá honum alt prentiarbeiði fyri ráðharrastovuna, sum hann áður hevði havt, og gjørdi honum samstundis greitt, at um hann framyvir vildi lata vera við at skriva um tílíkt, skuldi hann fáa arbeiðið aftur.

Men Johan Walter vrakaði tilboðið frá ráðharranum, og frá hesi løtu, skrivar dómpróasturin, var »Times« í langar tíðir sermerkt av, at hvørki valdsharrar ella annað harkalið fekk ávirkan á blaðið.

Fyrilitaleysa hugsanin í jarnbreytarpartabrøvum

At so var, kom best til sjóndar, tá ið lýsingarnar til blaðið í 1845 streymaðu inn í sambandi við sokallaðu jarnbreytarspekulatiónina í Onglandi, inntøkan hjá »Times«, ið stóðst av hesum, lá um 150.000 kr. um vikuna.

Um hetta mundið gjørdist sonur Johan Walter blaðstjóri á »Times«. Hann órógvaðist av vandanum, henda fyrilitaleysa spekulatión í jarnbreytarmálinum kundi føra til fyri land og fólk, tí tað hevði endað við størari fíggjarkeppu.

Hesin ungi blaðstjóri, sigur Skovgård Pedersen, hugsaði ikki fyrst og fremst um egnan vinning av øllum teim mongu lýsingum, ið nærmast oystu pening inn til blaðið, men fór óræddur í herferð ímóti teimum, ið stóðu aftan fyri lokkandi lýsingarnar.

Blaðstjórin á »Times« tryggjaði sær óheftar hjálparmenn, ið vóru førir fyri at viðgera málið til botns og føra fram sannleiksprógv m.a. um stóra vandan, almenningurin við sínum sparipeningi fór at koma í við hesum jarnbreytarpartabrøvum.

Ósjálvsøkni og reiðiligheit sigraðu

Herferðin hjá blaðstjóranum førdi til, at umrøddu lýsingar hvurvu úr blaðnum og eisini inntøkan, blaðið so harðliga í sín byrjan hevði brúk fyri.

Men brátt kom til sjóndar, at ósjálvsøkni og reiðiligheit blaðsins í hesum máli vóru atvoldin til, at fleiri og fleiri fingu eyguni upp fyri »Times« og gjørdust haldarar av blaðnum.

Skovgård Pedersen dómpróstur sigur at enda: »Hervið er »Times« við tíðini vorðið eitt heimsumfatandi, og »Walter blaðkongaættin« ein megi, hvørs ávirkan er uttan síðustykki« í blaðheiminum.

Sjálvt um onkur vildi hildið, at søgubrotið hjá S. Pedersen dómprósti er ov gamalt til nútíðina, sum so mangt annað, so kunnu nokk fleiri vera samd í, at teir, ið skipaðu fyri blaðútgávu av »Times«, settu sær sjálvum krøv, ið vóru ófrávíkilig, tá tað snúði seg um moral og etikk, kosta hvat tað vildi.



Skal nútíðarsamfelagið og tess vinnuvegir haldast uppi, er neyðugt við tonkum og gerðum av somu dygd, sum teir høvdu, ið av fyrstan tíð byrjaðu omanfyri umrøddu blaðútgávu. Alternativið er undirgangur.

Jóhs. M. Olsen